Viðmerkingar til uppskot til Løgtingslóg um løggilding av elinnleggjarafyritøkur.

- Vísandi til Kapitul 3. § 5. stk. 2. 3) *Har tað verður sagt at talan ikki kann verða um størri og fakliga meira krevjandi uppgávur* og §8. stk. 1. 4*) Har tað verður álagt teimum at at luttaka á teimum skeiðum sum landstýri ásetur.* So haldi eg at tað má verða samsvar herímillum fyri teimum hjávinnugóðkendu innleggjarunum, á tann hátt at skeiðini eru í trá við hesa áseting, og at hann ikki nýtist at fara á kostnaðarmikil skeiðir, sum eru á fakligum støði yvir tí sum hann hevur góðkenning at útføra.

- Vísandi til kapitul 5. um góðskuskipan, so eru ásetingarnar galdandi fyri fyritøkur, og í viðmerkingunum verður staðfest at hjávinnugóðkendur innleggjari eisini kemur undir hesar ásetingarnar. Eg eri sera yvingarsamur um hettar ti talan kann verða um umfatandi og kostnaðarmikil skeiðir, við einum sera breiðum innihaldi, har stórur partur er ætlað sum stýringsamboð hjá fyritøkum. Eg haldi at tað má skynast millum hvat skeiðsinnihaldi skal umfata hjá fyritøkum sum hava fleiri starvsfólk í starvi, í mun til ein hjávinnugóðkendan innleggjara, sum útinnur allar uppgávurnar sjálvur.

- At løggildingin bert kann vera fyri eitt 5 ára skeið, haldi eg isolerað sæð, ikki er rímiligt. Her átti at bori til at gjørt reglur fyri, at ein sum kann ávísa at hann hevur verið í hesari vinnu í eitt ávíst tíðarskeið seinastu 5 árini, kundi fingið løggildingina longda í eitt nýtt 5 ára skeið.
  Her má viðmerkjast at tað eru fleiri av teimum sum standa fyri løggildingini hjá teimum størru fyritøkunum, í stóran mun taka sær av tí umsitingarliga partinum, og sostatt ikki eru úti í "markini" fyri at góðskutryggja tey útførdu arbeiðini. Her átt eisini at verið stramma upp, soleiðis at álagt verður størri fyritøkum at løggildingin onkursvegna er tengd at persónum, sum eru á staðnum fyri at góðkenna arbeiðini.

Vh.

Ólavur Gunnarsson formaður í Maskinmeistarafelagnum